# Oddagrein

**Eyðun Klakstein**
*eydun@sosialurin.fo*



# BRÚK FYRI UMBOÐI

Í fjør fingu føroyingar alment Brúkaraumboð, sum skuldu hava eftirlit við marknaðarføringslógini og virka fyri góðum marknaðarføringssiði. Hetta var nógv ár eftir, at okkara grannalond fingu slíka lóg og eftirlitsstovn. Fyrsta árið gjørdist sjálvt hendingarríkt hjá Brúkaraumboðnum, tí fólk stóðu mest sum í kø fyri at kæra sína neyð. Fyrsta árið vóru fleiri enn hundrað mál viðgjørd, og líka nógv vóru avvíst.

Nógvu fyrispurningarnir og kærurnar til Brúkaraumboðið vísa, at brúk er fyri einum umboði av hesum slagi. Misnøgd millum fólk um marknaðarføring kundi nú latast einum stovni, sum kann taka avgerð í málum, sum frammanundan ofta endaðu sum kegl millum fólk og fyritøkur. Hetta er ein stórur fyrimunur fyri bæði brúkaran og tey, sum marknaðarføra vørur og tænastur, tí tað er betri at fáa eina niðurstøðu á einum trætumáli, enn at lata málið enda uttan enda.

Greiðar ábendingar hava eisini verið um, at vinnan hevur sýnt nýggja Brúkaraumboðnum neyðuga virðing, og at Brúkaraumboðið ofta er farin í konstruktivan dialog við fyritøkur hevur eisini slóðað fyri einum betri samstarv, enn um nevin var á lofti frá byrjan og allatíðina. Stovnurin hevur tilvitað lagt varisliga fyri, og tað hevur verið skilagott, tí sjálvsagt skulu bæði brúkarar, vinnufyritøkur og onnur venja seg við stovnin.

Tað talar eisini Brúkaraumboðnum til rós, at stovnurin hevur havt stutta viðgerðartíð a nógvum málum. Viðhvørt hevur tað bara snúð seg um fáar dagar, so er ein avgerð fallin. Onnur meira fløkt mál hava sjálvsagt tikið longri tíð, men eina miðal viðgerðartíð upp á 20 dagar kundu nógvir aðrir almennir stovnar lært av.

Í hesum døgum er øsingin stór um nyggja heimabankan hjá føroysku peningastovnunum. Fólk eru ørkymlað um nýggju skipanina og ómaksgjøldini, sum peningastovnarnir taka. Brúk-



araumboðið kann í løtuni ikki viðgera mál, sum snúgva sum peningastovnarnar, men ivaleyst eru tey mong, sum høvdu ynskt ein slíkan eftirlitsstovn, sum kundi viðgera ítøkilig bankamál skjótt og væl. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur róð fram undir, at Brúkaraumboðið skal fáa øktar heimildir til at viðgera mál við tilknýti til peningastovnarnar, men tað fer at taka rúma tíð at fáa hesa broyting gjøgnumførda, hóast ynskiligt hevði verið við einari skjótari broyting á hesum øki.

**» Eina miðal viðgerðartíð upp á 20 dagar kundu nógvir aðrir almennir stovnar lært av.**

---

## Fyrsti Beatlin rundar 70

Í dag fyllir Ringo Starr sjeyti ár. Trummusláarin í heimsins størsta tónleikabólki hevur verið kallaður tann vinarligi Beatlin, tann stilli Beatlin og tann fjolluti Beatlin, men sjálvur hugsar hann meira um frið á jørð.

Ringo Starr sigur, at hann ynskir sær bert eina føðingardagsgávu, og tað er frið og kærleika. Hann heldur, at í dag skulu øll fólk gera friðarteknið við fingrunum, og hann droymir um, at tað veruliga verður friður á hansara føðingardegi einaferð – helst um middagsleitið.

Ringo Starr er tann fyrsti Beatlin, sum rundar tey sjeyti. John Lennon og George Harrison doyðu, áðrenn teir gjørdust so gamlir, og í juni mánaði næsta ár fyllir Paul McCartney 70.

Tað hevur verið tosað um, at Ringo Starr hevði føroysk ættarbond, men hann hevur so ikki vitjað í Føroyum, tað vit vita um.





**» Statt við títt orð, løgmaður**

HEÐIN MORTENSEN
KJAK Á SÍÐU 10



**» Takk og lov fyri MUTE**

AGGA NICLASEN
TÍÐARGREIN Á SÍÐU 13



## Loðbýflugur ynskjast

Jens-Kjeld Jensen er nú farin at leita eftir upplýsingum um sonevndu loðbýflugurnar.

Tann fyrsta loðbýflugan, sum vit hava kunnleika um, varð fangað í Føroyum í 1887. Síðani tá hava tær verið at sæð hendinga ferð kring landið.

Hesi seinru árini eru alt fleiri fráboðanir komnar inn um loðbýflugur, og hóast alt bendir á tað, kunnu vit ikki prógva, at hon ynglar, tí enn er einki býli funnið.

Loðbýfluga hevur heilt víst ynglað í Føroyum í fornari tíð – serliga í víkingatíðini, tá veðurlagið var nakað lýggjari enn í dag.

Tey ymisky sløgini av loðbýflugum eru rættiliga ymisk á at líta. Tær eru ymiskar í støðd og hava ymiskar litir. Nakrar eru gular og hvítrondutar, aðrar eru svartar og hava reyðan afturpart. Men eitt hava tær allar til felags – tær eru prúðar á at líta, tær surra og eru lodnar.

– Nú eg eri við at savna saman tað tilfar, ið finst um loðbýflugur í Føroyum, vil eg ógvuliga fegin koma í samband við fólk kring landið, sum antin síggja ella hava sæð hesi lodnu flogkykt, hava tikið myndir ella møguliga fangað eina loðbýflugu. Alt hevur áhuga, sigur Jens-Kjeld Jensen.

Sosialurin
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,** sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*